Bilar

Nr. 122 • hósdagur • 30. juni 2005 • 79. árg.



*Toledo innan. Forsetrini kunnu slillast í hædd, og rattið kann stillast bæði í hædd og aftur og fram, so lætt er at finna sær ta heilt røttu koyristøðuna*

Seat Toledo:

# Flott spanskt "designstudie"

**Nýggi Seat Toledo er eitt heilt nýtt konsept. Bilurin, ið er sermerktur og smartur, er eisini sera praktiskur og ein tann rúmligasti í sínum klassa við stórum viðførisrúmi, sum er heilar 500 litrar**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*




*Nýggi Seat Toledo er eitt heilt nýtt konsept. Bilurin, ið er sermerktur og smartur, er eisini sera praktiskur og ein tann rúmligasti í sínum klassa*

**Spanska bilverksmiðjan Sociedad Española de Automóviles de Turismo (SEAT) varð sett á stovn 9. mai 1950 í Barcelona. Í dag hoyrir Seat til VW-konsernina og eru limir í Audi-group saman við Lamborghini. Teir hava ein av heimsins dugnaligastu bildesignum, Walter de Silva, sum designstjóra.**

At Seat hava fingið sín egna stíl, er nýggi Seat Toledo besta dømi um. Talan er um eitt heilt nýtt konsept. Hesin Toledo er triðja generatión. Fyrsti Toledo kom á marknaðin í 1991.

"Smag og behag er vidt forskellig" sigur orðatakið. Tað er í øllum førum galdandi fyri nýggja Toledo, ið hevur eina útsjónd aftan,




*Baklúkan til 500 litra stóra viðførisrúmi er stór og fer langt upp*



*Útsjóndina aftan hava tey flestu eina meining um, hon er bæði nútímans og nakað í gamlan stíl*

sum tey flestu hava eina meining um.

Designið er eisini rættuliga sermerkt og smart, bæði nútímans og nakað í gamlan stíl.

Bilurin er praktiskur og ein tann rúmligasti í sínum klassa við stórum viðførisrúmi, sum er heilar 500 litrar. Innan er nógv gjørt burtur úr við tilfari í góðum gjøgnumførdum kvaliteti. Variabla elektroniska servostýringin við automatiskari sjálvupprætting og væl virkandi undirvognurin geva bilinum koyrieginleikar í toppklassa. 16" hjól eru standard.

Fýra motorar eru at velja ímillum, tveir bensin og tveir diesel. Bensinmotorarnir eru: 1,6 litur við 102 hk, og 2,0 litur FSI við 150 hk. Dieselmotorarnir eru: 1,9 litur TDI við 105 hk, og 2,0 litur við 140 hk.

### Reference og Stylance

Hvat útgerð viðvíkur fæst Toledo í útgávunum Reference og Stylance. Hóast Reference er standard útgávan, er talan um ein væl útgjørdan bil. Saman við tí at forsetrini kunnu slillast í hædd, kann rattið stillast bæði í hædd og aftur og fram, so lætt er at finna sær ta heilt røttu koyristøðuna. Setrini eru gjørd í góðum kvaliteti við innbygdum skúmi, sum tekur burtur ristingar, og ger at tey ferðandi ikki møðast undir koyring.

ASR (antispinn), og ESP (Elektronsik Stabilitets Program), DSR (Dynamic Steering Responce), ISOFIX (til at festa barnastólar), og seks airbag er standard. Stylance hevur t.d. koyriteldu, tokulyktir, og fartpilot.

Nú fáa nýggir bilar eisini karakter fyri, hvussu fótgangaravinarligir teir eru. Framman er Toledo gjørdur soleiðis, at hann gevur eftir, um ein fótgangari verður ákoyrdur, so persónurin fær minst møguligan skaða.

Umframt Referance og Stylance fæst Toledo við nógvari ymiskari eykaútgerð. Bilurin kann síggjast og roynast hjá Bilasøluni í Hoyvík. Prísirnir byrja við kr. 223.000,- fyri ein Referance við 1,6 litur bensinmotori.

### Seat Toledo 1,9 TDI Stylance

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1,9 litur 4 syl. TDI (diesel) 105 hk v. turbo og pumpu-dysu innspræning |
| 0-100 km/t | 12,4 sek. |
| Oljunýtsla | 18,2 km/l |
| Dekkstødd | 205/55-16 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 446,0 cm |
| Breidd | 177,0 cm |
| Hædd | 157,0 cm |
| Eginvekt | 1.375 kg |
| Viðførisrúm | 500 litrar |
| Prísur | kr. 277.000,- |
| Søluumboð | P/F Bilasølan<br>Vegurin Langi<br>Tel. 315354<br>www.bilasolan.fo |